# Nógv borivirksemi á Atlantsmótinum komandi árini

**Transocean Rather borar aftur við markið. BP skal brúka pallin at bora William í summar – óvissa um hann verður klárur tá**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Eftir ein steðg í boringini í sambandi við, at veitingarskipið Bourbon Dolphin koppaði og seinni sakk, setti boripallurin "Transocean Rather" fyri góðari viku síðani borin í aftur undirgrundina á Rosebankleiðini, skamt frá føroyska markinum. Sosialurin skilur frá oljukeldum í Aberdeen, at nú er so farið undir at bora henda næsta av trimum avmarkingar- og metingarbrunnum á stóru oljukelduni Rosebank, sum verður mett at verða eitt lønandi fund. Chevron, sum er fyristøðufelag, hevur verið sera óheppið við hesi stóru boriverkætlanini á Atlantsmótinum, fyri tað mesta orsakað av ringum veðri allan vetur. Fyrsti brunnurin varð nógv seinkaður, men leysatíðindini vóru so tey, at úrslitið av boringini var gott.

Nú er so farið undir næsta brunnin, og stórur spenningur er í oljuvinnuni, um hesin fer at rigga eins væl og tann fyrsti. Tá hesin er liðugt boraður um 1 til 3 mánaðir, verður farið at bora tann seinasta brunnin á Rosebankfeltinum. Tað kann væl henda, at henda boriætlanin verður ikki liðug fyrr enn út á heystið ella seinni í ár, og tað kann koma at ávirka boringina hjá BP á føroyska landgrunninum, sum er sett til at vera í summar. BP skal nevniliga brúka sama boripallin, Transocean Rather.

Stjórin í BP, Hjarnar Djurhuus hevur sagt, at teir fyribils fylgja upprunaligu ætlanini, men Sosialurin veit frá keldum, at tað skal ganga ómetaliga væl í hond hjá Chevron, skal BP fáa boripallin í summar ella entá í heyst. Og her kann so óhappið við veitingarskipinum spøkja aftur. Transocean er ein sokallaður akkersriggur, tvs. at hann verður festur fastur í havbotnin við akkerum. Seinasta óhappið á Rosebankfeltinum, sum nettupp varð orsakað av akkersketum, kann gera, at oljufeløg í framtíðini heldur velja at brúka boripallar, sum halda seg á kósini við egnari motororku heldur enn at brúka akkersketur. Um so er, at BP ikki fær pallin fyrr enn úti á heystið ella í vetur, tá ódnirnar aftur herja, kann tað hugsast at vera sera ivasamt, um felagið torir at byrja eina boring við nettupp einum sokallaðum akkersriggi siga keldur í oljuumhvørvinum. Tá er heldur hugsandi, at felagið bíðar við at bora til næsta vár ella summar. Men sum sagt áður: BP heldur seg fyribils til upprunaligu ætlanina.

## Spennandi ENI boring

Umframt Williambrunnin hjá BP stendur eisini Anne Marie brunnurin hjá ENI á komandi boriskránni á føroyska landgrunninum. Hesin brunnurin verður boraður næsta summar og liggur hann tættari upp at markinum millum Føroyar og Bretland. Oljukeldur Sosialurin hevur tosað við siga, at sannlíkindini at gera eitt fund á landgrunninum á hesum báðum komandi boriætlanunum er størri í loyvinum hjá ENI. Hesin brunnurin liggur nevniliga nærri øðrum kendum brunnum, sum eru boraðir beint hinumegin markið í bretskum øki, har olja er funnin. Jarðfrøðin er tí betri kend her og hevur ENI tí aðrar brunnar og jarðfrøði at halda seg til. Williambrunnurin hjá BP liggur sera langt burturi frá kendum brunnum og er eins og Brugdan ein sera váðiligur brunnur.




*Chevron hevur nógv jørn í eldinum komandi árini, bæði á brestkum og føroyskum øki. Gulu økini vísa leitiloyvi hjá felagnum*

Tað positiva við William í mun til Anne Marie er tó, at strukturin í undirgrundini, har vónir eru um at raka við olju, er sera stórur.

## Cambo

Sum skilst verður framvegis arbeitt við at finna boripall til at bora tveir avmarkingar- og metingarbrunnar á Camboøkinum bretskumegin markið. Amerada Hess, sum í síni tíð var sera virkið í Føroyum, er fyristøðufelag. Sosialurin skilur, at nógvir boripallar vera tøkir seinni í komandi ári, her eisini boripallar, sum ikki skulu festast í havbotnin við akkersketum. Ein vanlukka vestan fyri Afrika nøkur ár herfyri, har bæði veitingarskip og manning hvurvu í havsins dýpi og nú hendingin við Bourbon Dolphin hava givið oljufeløgunum, sum bora á stórum dýpi og í veðurringum økjum, nakað at hugsa um. Roknast má við, at feløgini í framtíðini fara at leggja seg eftir at brúka nútímans boripallar og boriskip, sum sjálvi halda seg á kósini við framkomnari tøkni.

Chevron, sum er eitt tað mest virkna oljufelagið á Atlantsmótinum, hevur latið byggja eitt sera framkomið boriskip og ein boripall, sum skulu standa fyri eini stórari boriverkætlan á Atlantsmótinum í 2008 og 2009, her eisini í Føroyum. Felagið hevur nevniliga tørv á nógvari boriorku komandi árini um so er og hvat útlit eru til, at Rosebank er lønandi og skal útbyggjast. Haraftrat er Chevron fyristøðufelag fyri fleiri loyvi á bretskum øki, framvið føroyska markinum, sum skulu borast komandi árini. Eisini hevur felagið fyrr sagt frá, at tað fer at bora sín fyrsta brunn á føroyska landgrunninum í 2008 ella 2009. Hesin verður boraður nær markið stutt frá Rosebankkelduni. Sum skilst fer Chevron undir seismiskar kanningar í summar. Tær eru uttan iva grundarlag undir ætlanini at bora komandi árini.

Á oljuráðstevnuni Offshore Faroes herfyri varð greitt frá, at einir 7 leitibrunnar verða boraðir vestan fyri Hetland komandi tvey árini. Umframt Chevron eru feløg sum OMV og Dong sera virkin. Tað ljóðar, at heimsins størsta oljufelag, ExxonMobile, sum áður hevur verið sera virkið á Atlantsmótinum men seinni tók seg aftur, nú er farið at vísa áhuga fyri økinum aftur. Møguleiki er fyri, at felagið eins og onnur feløg fara at sneyta til boringina hjá ENI og velja at "farma" inn tvs. keypa seg inn í tann brunnin, har ENI hevur ein lutvíst stóran part saman við Føroya Kolvetni. Hugsast kann at ENI fegið vil spjaða váðan.

# Atlants Kolvetni við í nýggjum leitiloyvi




FØROYSK OLJUFELAG
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Føroya oljufelagið Atlantic Petroleum, sum er virkið bæði í føroyskum, bretskum og írskum øki hevur gjørt av at keypa seg inn í enn eitt leitiloyvi á bretska landgrunninum. Talan er um loyvið P1228 við Endeavour Energy UK Limited sum fyristøðufelag. Loyvið varð latið í 22. útbjóðing í 2004 til Endeavour Reach Exploration (North Sea) Limited og fevnir um blokkarnar 30/23b. Ætlanin er at bora brunn í loyvinum. Í løtuni verður umsóknin at "farma" inn í loyvið viðgjørt av bretsku orkumyndugleikunum, DTI. Tá endaliga loyvið er komið uppá pláss fer Endavour at eiga 45%, Svenska Petroleum Exploration AB 25%, Reach 15% og Atlantic Petroleum 15%.

Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum sigur í eini viðmerking, at endamálið við at keypa seg inn í hetta nýggja loyvið í Norðsjónum er partur av virknu royndunum hjá felagnum at vera við í leitiprojektum, sum mugu metast at hava høga góðsku og at kunna vera við í oljuframleiðslu á hesum leiðum. Hann sigur, at boringin í Balgownie leitiprospektinum er ein partur av samlaðu boriverkætlanini hjá felagnum, sum fevnir um sjey brunnar. – Vit síggja fram til at seta borin í og at arbeiða tætt saman við Endevour og hinum nýggjum partarunum sigur Wilhelm Petersen.

*Atlantic Petroleum er við í nógvum leitiloyvum í bretskum øki. Myndina, sum føroyski vinnuolívsmaðurin Óli Samró hevur tikið, vísir "snurritoppin" tvs. serstaka framleiðslupallin, sum skal standa fyri framleiðsluni á einum av teimum feltunum, sum Atlantic Petroelum er partur av. Pallurin er gjørdur í Suðurkorea og er her stæddur í Amsterdam.*